# Video/DVD 3arin Fløgur

## the sims unleashed



Nú er enn eitt spæl komið í The Sims røðini. Nú hevur tú møguleikan at geva tínum Simmarum eitt kelidjór. Tú skalt læra kelidjórini at verða reinlig, læra tey at gera okkurt serligt, keypa teimum leikutoy, geva teimum at eta og gera títt besta til, at tey ikki oyðileggja húsið.

Fyri at kunna spæla hetta spælið mást tú eiga tað orginala »The Sims« spælið.

Men tá tú ert farin í gongd, so kanst tú fara í djórahandilin og adoptera ein hund, eina kettu ella okkurt annað djór til tínar Simmar.

Nú eru eisini fimm karrierur afturat at velja í millum og har eru 50 nýggj arbeiði, og tú kanst eisini fáa tær ein grønmetisgarð. Nýggja Sims spælið er nú at fáa, og ert tú ein av teimum, ið dámar at spæla The Sims, so er at renna niðan í 3´aran og ogna tær spælið áðrenn grannin ger...

## back to the future



Teir einaferð so vælumtóktu 80´ara filmarnir hjá Steven Spielberg eru nú endurútgivnir. Allir tríggir Back to the Future filmarnir við Michael J. Fox og Christopher Lloyd í høvuðsleiklutunum eru nú á DVD fyri fyrstu ferð.

Filmarnir hava nú fingið digitalt ljóð og ein rúgva av eyka scenum og eyka tilfari er lagt afturat hesi boksini við teimum trimum filmunum. Talan er um tvær dvd fløgur og umframt teir tríggjar filmarnar eru fimm tímar av eyka tilfari.

## hanging by a moment two



Ein onnur savnsfløga er eisini júst komin á marknaðin. Talan er um fløguna Hanging by a Moment 2. So ert tú til eitt sindur villari tónleik enn løgini, sum eru á Woman fløguni, so er at ogna tær hesa fløguna. Her fært tú nógvan góðan tónleik frá millum annað Jupiter Day, Incubus, Nickelback, The Calling, Kent og øðrum.

Tilsamans eru 20 løg á fløguni við 20 ymiskum einstaklingum ella bólkum.

## woman v




Fimta Woman fløgan er nú komin út. Við eru bæði eldri og nýggjari sangir hjá kvinnuligum einstaklingum ella bólkum. Hetta er ein dupultfløga og tilsamans eru 40 skeringar at velja ímillum.

Nevnast kunnu millum annað Jennifer Lopez, Atomic Kitten, Alicia Keys, Mariah Carey, Celine Dion, Pink, Destiny´s Child, Britney Spears, Annie Lennox, Lauryn Hill og Björk.



## Toto - Through The Looking Glass

So eru teir aftur, menninir í Toto. Óbundnir og leysir av ósjónligum trælaeigarum, sum teir taka til. Superbólkurin, sum enntá hevur staðið á palli í Føroyum.

Men hesaferð eru teir aftur, sum vit ongantíð hava hoyrt teir áður. Teir spæla ikki síni egnu løg, sum teir jú oftast koma sera væl frá, men teir spæla ístaðin løg hjá øðrum. Coverløg. Klassikarar.

Toto byrjaði, siga søgur, sum ein samanrenning av nøkrum studiotónleikarum, sum dugdu síni ting og sum funnu útav, at teir hóskaðu saman. Og teir hava hóskað væl, bæði saman, og saman við okkum øðrum nú í mong ár.

Toto og nýggja útgávan Through the looking glass er ein framúr fløga. Toto er ein av teimum bólkunum, har ein ikki fer skeivur av, hvørjum tað er ein lurtar eftir. Tað hoyrist, tá tað er Toto.

Tó er alt so nógv øðrvísi hesaferð. Hetta er og verður ein øðrvísi Toto útgáva.

Teir leika løg hjá Bob Marley, Walter Becker og Donald Fagan, George Harrison, Barrett Strong og Norman Whitfield, Stevie Wonder, Herbie Hancock, Elton John og Bernie Taupin, Jack Bruce, Peter Constant og Eric Clapton, Elvis Costello og Bob Dylan. Og so er eisini tann traditionelli House of The Rising Sun við.

Toto siga á útgávuni millum annað, at - well, her eru teir aftur. Tíð er at kaða í bókina. At kaða aftur um bak, aftur í tíðina. Tí einaferð var tað ein sangur við einum lag, ið hevði orð við eini meining. Gev okkum eitt beat, útgerð, nakrar wannabes og so framvegis og eitt upptøkutól, ið er eitt tól, ið loyvir einum at ferðast í tíð til eina og hvørja tíð.

We're not worthy!!!, siga teir í Toto við allar teir stóru sangararnar og sangskrivararnar, ið teir leika á fløguni. Løgini, ið teir leika, ljóða enn í dag líka væl, sum tá teir fyrstu ferð hoyrdu tey. Hetta er tó gávan frá teimum í Toto til allar teir stóru, ið teir fingu loyvi, æru og eydnu til at hitta á leiðini.

Lat eyguni aftur og finn útav, at ein kann síggja við oyrunum, sigur manningin í Toto millum annað í fløguhúsanum.

Ein góð fløga frá Toto. Og als ikki líka sum allar hinar, tit vita, Hold The Line, Rosana, Afrika og so framvegis. Nei, her læra vit eitt annað Toto at kenna og tað er spennandi, eftir at hava kent henda superbólkin í mong ár.

Our love and apologies, siga Toto á húsanum til fløguna, sum teir hava ognað minninum um Jeff Pocaro.

### Fakta:



| | |
|---|---|
| Bólkur/einstaklingur: | Toto |
| Heiti á útgávu: | Through the looking glass |
| Skeringar á útgávu: | 11 |
| Longd á útgávu: | 55,42 min |
| Framleiðari: | Toto |
| Útgávufelag: | Toto Recording Inc., CMC |

Meting:

| | |
|---|---|
| Ljóðgóðska: | ●●●● |
| Dygd í løgum: | ●●● |
| Heildarmeting: | ●●●● |

## Topp 10 - CDRom

01. The Sims - Unleashed
02. Total Club Manager 2003
03. Hitman 2 - Silent Assassin
04. Unreal Tournament 2003
05. The Sims - Deluxe Edition
06. The Sims - House Party
07. Mafia
08. Grand Theft Auto 3
09. Delta Force - Task Force Dagger
10. Soldier Of Fortune - Double II Helix

## Topp 10 - video

01. Crossroads
02. Time Machine
03. Ringenes Herre
04. A Beautiful Mind
05. Black Hawk Down
06. Finn & Co.
07. Rat Race
08. Collateral Damage
09. Bring It On
10. Panic Room

## Topp 10 - DVD

01. Time Machine
02. Panic Room
03. Black Hawk Damage
04. Collateral Damage
05. Sweetest Ting
06. Legend Of The Red Drageon
07. Asterix & Obelix
08. Ringenes Herre
09. Crossroads
10. 40 Days & 40 Nights

3arin



# Ríkmennini við fylgi

Sóust teir aftur
sjónskari enn áður

í sjálvtøku gulltíðunum
tømdu trogið
arbeiðarafjøldin
slitnu,bløðandi hendurnar
aftur tað fylti
ragammarnir altíð til reiðar

hesir marglætiskropparnir
ríkmennini

nú mangar ferðir fleiri
-tíggjuferðir-
ein óteljandi hópur

í spekulantafylginum
børn teirra
við fylgi

ein ørgrynna av spekulantum
floymdu inn yvir aftur landið

settust á tær feitastu røkurnar
feitilendini vórðu fullsett

skræddu alt í seg
sum fyri var
og meir afturat

vit standa bert og hyggja
dølskir og dovnir áskoðarar

líkasælan valdar
okkara talsmenn
steinsova

meðan hesir
marglætiskropparnir
ríkmennini
og teirra avkom
kunnu skalta og valta
við fólksins ogn
okkara ogn
tilfeingi á sjógvi og landi
vinnutólini
sum teimum lystir

til felagsskapin
ikki eitt oyra gjalda

løgið, líkasælt og sjálvsøkið fólk

frálík gróðralíkindi
hjá
smábólkamentalitetinum
klubbmentalitetinum

hvat er vorðið av

solidaritetinum?
stríðsandanum?-rakstrarrópunum?
mótmælunum?

rættvísishugsjónini?

køvd í materalismunnar valdi !

jú sanniliga
spekulantarnir hava fríar ræsur.

sníkjandi sum sóttin
innar í hvørja kroysu
neyðtaka og eyðræna
alt á teirra ferð

saman við
teirra útvalda fylgi

nú eru spekulantabørnini
vorðin vaksin
-og væl skúlað
spekulantaskúlarnir eru margfaldir -
ein spegilsmynd av
foreldrunum
vesturlendsku marglætissamfeløgunum

komu afturí aftur
tó teir altíð hava
verið her
nú aftur
sjónskir í fjøldini

í øllum samfelagsliðum
ríviligt er til
av føðslu

verða aldri mettir

síggjast aftur
í ymsum skortum
tó mangar ferðir grammari
enn áður

tó muran tann sama
kraddaralyndið stingur djúpt
eirindaleysir ránsmenn
við valdsharranna vælsignilsi

ongin torir
vil
steðga teimum
á ránsferð teirra

hetta kærkomna,vælsignaða
høgrarákið
spekulantanna verndareingil

vinstraódnirnar
fýsa eitt sindur
av og á
øsa sjógvin upp

men um lítið bil
tekur høgrarákið
tær í favn

rura,rura, rura

og aftur valdar
tøgnin
og líkasæla lognin aftur

frælslynta hugsjónin
letur seg køva
av tí snilda,eirindaleysa

høgrarákinum

stórkapitalurin
fleirtjóðaspekulantar-og fyritøkur
floyma inn yvir landið
við sínum skitnu og eitrandi vápnum

stórkapitalurin og
tess leigusveinar
siga hvar skápið skal standa
hálovaðir av valdsharrunum

spekulantar altíð til reiðar
við síni hjálpandi hond

valdsharrarnir taka móti hesum
ránsmonnum
við opnum favni

fólkið bløðir
og fellur
í líkasælunnartrog
steinsvevur
og verður liggjandi
óvirkið
eingin glottar fyri stavn

vinstravongurin
letur standa til
-stríðsandin er horvin
skríggjandi úti í havsbrúnni -
liggur undir skjúrtuvelinum
í luð av
høgrarákinum
rekur fyri vág og vind
vaknar aftur
við kaldan dreym
men tá er ov seint

fleirtjóða spekulantar
og teirra leigusveinar
her heima
fóðra ungdómin við alskyns dramblæti
glantrileikum
eitrandi lognbrá

yvirstættin
luksusdýrini
og avkomið
hava selt sín sál til
spekulantarnar

fínarimpurnar
snákurnar
liva í einum
veitslurúsi

fróðarliðið
granskar
er í valdinum
á
eitrandi,dálkandi
fleirtjóðaspekulantunum
og valdsharrunum

tey á skuggasíðuni

eru óynskt
flýggja
goymd burtur
undir tí dýggjvátu
vaðingini

eitt uppstása miðaldarsamfelag

høgrarákið kínir tær
blítt um ennið
og rurar teg í blund

børnini spæla sær í morgunsólini
kring glæstriborgirnar
í náðum
meðan fínarimpurnar snorksova

vakna aftur tá
ríkmannaveitsluhornið
aftur gjellur

tó kann eg hóma
stríðsmerkið mikla
spakuliga koma

og vekja okkum
til tann nýggja
blóðreyða
morgunin
ið brátt kemur!

verið árvaknir
stríðsfelagar
brøður og systrar!!

fylkist í hóp
og blásið í sigurslúðurin stinna!

tann fullkomni
solidaritsandin
vil sigra!

børnini leika á bønum
og binda sóljukransar.

framtíðin er okkara
tilfeingið alt
bæði á sjógvi og landið
vinnutólini
verksmiðjurnar
alt vit hava bygd upp
við okkara stríðsmerktu hondum
er fólksins ogn

kraddarapakkið verður rikið
á dyr!
fær durafjórðingin med alla !
sigurin verður okkara!

Fagurt tá verður at liva á foldum!

**Sólmundur Joensen**
27.sept-2002

# Føroya Pro Vita 10 ár

TÍÐINDASKRIV
*Føroya Pro Vita*

Føroya Pro Vita í 10 ár! Hesi 10 árini, F. P. V. hevur virkað, hava vit millum annað haft eina ráðgevaratænastu, lagt til rættis undirvísingartilfar og fingið hetta út til skúlarnar. Vit hava eisini boðið dugandi fólki til at greina spurningar um mannavirðið á medicinsketiska økinum og onnur samanberandi evni, so sum fosturdráp, horvni pápin, at vera foreldur til barn við Downs syndrom, angribollin, eutanasi, umsorgan fyri doyggjandi, gengransking, reproduktiónsteknologi og postabortion syndromet. Eisini er upparbeitt eitt bóka- og videoútlán.

Tað nyttar at stríðast! Tí ímeðan vit fyri 10 árum síðan sóu illviljan ímóti at nema við henda týdningarmesta spurningin av øllum, tað veri seg átrúnarligt eins væl og politiskt, barnið í móðurlívi, so upplivdu vit til seinasta val, at tíðindafólk settu fram spurningin til allar flokkar, hvat við fosturdrápinum. Og so vítt vit kundu hoyra, var tað eingin, ið tordi at siag: lat børnini bara doyggja.

Støðan er sera álvarsom. Ímeðan flokkar her heima tosaðu um pláss og plásstrot fyri gomlum, visti DR1 í eini DR-Dokumentar at siga hyggjarum sínum undir yvirskriftini »Det store babykrak« at Evropa er við at gerast »Heimsins ellisheim«. 15 lond í Evropa fylla fleiri kistur enn vøggur og undirskoti í føðingum er 2 milliónir børn árliga. Og meðan politikarar her heima tosa um strangan innflytarapolitikk, visti sendingin at siga frá, at næstu 24 árini hevur Evropa tørv á 225 milliónum innflytarum til tess at varðveita fólkagrundarlagið. Gongdin í løtuni bleiv samanlíknað við »kollektivt selvmord« og ein økonomur segði, at gongdin hótti vælferðina.

Angribollin: Eitt mál, sum vit hava arbeitt við, er at siga frá um sonevnda angribollan. Hetta er eitt álvarsmál, sum uttan iva verður tann stóri fosturdreparin. Vit hava sent politiska myndugleikar-unum áheitan um at steðga søluni av hesum bolla. Við sorg mega vit ásanna, at áheitan okkara ikki er hoyrd.

Evnisdagur: Leygardagin 26. okt. í matarhøllini á Føroya Læraraskúla, hevur »Føroya Pro Vita« sín árliga evnisdag. Hesaferð eru fýra evni á skránni. »Lívið, heppin tilvild« – »Tá ið fyribyrging hevur við sær dráp« – »Royndir sæð í ljósinum frá norskum fosturtøkuvirksemi« og »Náttúrlig familjuplanlegging«.

Fyrilestrar. Fyrilestrarnar fer norski læknin Inger Lund Thorsen at halda. Inger hevur gjørt seg galdandi í kjakinum um fosturtøku í Norra. Hon kemur higar saman við manninum Arna. Fyrilestrarnir eru almennir og byrja verður kl. 10.10. Sí annars lýsing í blaðnum.